UTTAN ÚR HEIMI

## Kinesarar í Afrika

Í hesum døgum er kinesiski forsetin, Hu Jintao, á vitjan í Marokko, Nigeria og Kenya, og sambært altjóða eygleiðarum er ferðin ein staðfesting av, at Kina er vorðið tað stórveldið, sum spælir tann týdningarmesta leiklutin í Afrika í hesum árum.

Kinesiski samhandilin við Afrika er vaksin ómetaliga nógv tey seinastu árini, og í fjør keypti Kina afrikanskar vørur fyri 37 milliardir dollarar. Ætlandi verður talið trífaldað tey næstu tíggju árini. Nógv tað mesta, sum kinesarar keypa úr Afrika, er olja, sum kemur úr Sudan, Kongo og Angola, og kinesisk feløg hava samstundis gjørt stórar íløgur í oljuídnaðinum í hesum londunum. Eitt nú eiga kinesarar 40 prosent av tí største oljufelagnum í Sudan.

Fleiri lond í Vesturheiminum eru ørkymlað av tí veksandi samhandlinum ímillum Kina og lond í Afrika, tí gongdin vísir, at kinesarar eru sinnaðir at samstarva við lond sum eitt nú Sudan og Kongo, ið als ikki virða altjóða mannarættindini. Meðan fleiri lond tosa um at revsa Sudan fyri tað, sum hendir í Darfur, eru kinesisk feløg farin undir at byggja oljuleiðingar og avskipingarhavnir í landinum, og sudanska stjórnin ger alt fyri at tekkjast Kina. Eitt nú hevur sudanski herurin bumbað fleiri bygdir í oljuøkinum fyri at fáa fólk at flyta burtur haðani, so tey kinesisku feløgini kunnu sleppa framat, skrivar AP.

## Ætlaðu hópmorð í skúlanum

Amerikanska løgreglan hevur tikið seks 13 ára gamlar dreingir í bygdini North Pole nærhendis býnum Fairbanks í Alaska, tí teir høvdu lagt eina ætlan um at myrða næmingar og lærarar í skúlanum, sum teir gingu í. Sambært løgregluni vóru teir seks ikki einsamallir um ætlanina, men tað vóru teir, sum høvdu lagt álopið til rættis.

Løgregluovastin í Fairbanks, Paul Lindhag, sigur við amerikonsk bløð, at teir seks dreingirnir kendu seg happaðar í skúlanum, og at teir hildu seg fáa ov lítlan stuðul frá nøkrum av lærarunum. Sum skilst ætlaðu dreingirnir fyrst at kvetta elveitingina til skúlan, og síðani skuldu teir leypa á hinar næmingarnar og lærararnar við skotvápnum og knívi.

Avdúkingin í North Pole er ikki tann einasta av sínum slagi í USA ta seinastu vikuna. Í statinum Kansas hevur løgreglan tikið fimm dreingir, sum nú eru skuldsettir fyri at hava lagt eina ætlan um at myrða fleiri næmingar í einum skúla í býnum Riverton. Teir tiknu eru ímillum 16 og 18 ár.

## Hartar Bush

Fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Madeleine Albright heldur, at avgerðin hjá George W. Bush, forseta at leypa á Irak kann enda sum tað størsta uttanríkispolitiska mistakið í amerikonsku søguni.

– Víst var Saddam Hussein ræðuligur, men eg haldi ikki, at hann var nøkur hóttan ímóti USA. Tað ber ikki til at fara í kríggj við øll, sum einum ikki dámar, sigur Madeleine Albright í samrøðu við blaðið New York Times. Hon tekur undir við, at lond sum Irak eiga at vera demokratisk, men tað skal ikki gerast við tvingsli og herseting, sigur hon.

– At tvinga eitt fólk at taka við demokratii er ein sjálvmótsøgn. Fólk eiga at velja demokrati, og tað skal koma innaneftir, sigur Albright, sum var uttanríkisráðharri hjá Bill Clinton, forseta.

## Skuldi selja dóttur sína

Løgreglan í amerikanska statinum Wisconsin hevur tikið ein 37 ára gamlan mann, tí hann royndi at selja sína egnu dóttur.

Sambært løgregluni hevði maðurin boðið einum pari í býnum Grand Chute ta átjan mánaðar gomlu gentuna fyri 7.000 dollarar, men parið gjørdi av at siga løgregluni frá tí heldur sjáldsama tilboðnum, sigur CNN. Tann 37 ára gamli maðurin, sum er ættaður úr Vietnam, er nú tikin og kann fáa seks ára fongsulsrevsing.

Sambært CNN hevur maðurin greitt løgregluni frá, at hann ætlaði sær at selja gentuna, tí honum tørvaði pengar til at umvæla húsini fyri.

# Heimurin vendir teimum bakið

**Hungur, fólkamorð og rán hótta meiri enn tríggjar milliónir fólk í Darfur, meðan heimssamfelagið hyggur at**

DARFUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Hjálparfelagsskapir royna at hjálpa flóttafólkunum í Darfur, men teir noyðast at gevast um nakrar mánaðir, fáa teir ikki størri stuðul*

*Mynd: Reuters*

Fyri trimum árum síðani vóru 230 hjálparfólk í sudanska landspartinum Darfur og hjálptu teimum 350.000 flóttafólkunum har. Í dag eru hjálparfólkini 14.000 í tali og flóttafólkini 3,5 milliónir. Kortini eru tað umleið 200.000, sum ongan mat hava, og neyðhjálparsamskiparin hjá ST ávarar nú um, at játtar altjóða samfelagið ikki meiri pengar til hjálpina, steðgar alt hjálpararbeiðið í Darfur um nakrar mánaðir.

Jan Egeland, neyðhjálparsamskipari, var í síðstu viku í New York og greiddi ST-trygdarráðnum frá støðuni. Har kom millum annað fram, at higartil er tað bara Bretland, sum hevur latið størri neyðhjálp í ár enn í fjør, sjálvt um kreppan er tann ringasta av sínum slagi í heiminum.

Neyðin byrjaði fyri trimum árum síðani, tá fólkið í Darfur gjørdi uppreistur fyri at fáa størri sjálvræði. Sudanska stjórnin svaraði kravinum við at lata herin reka fólk burtur, og vápnað harkalið fingu frítt at fara. Umleið 70.000 fólk lótu lív, og meiri enn tvær milliónir fólk noyddust at rýma frá húsi og heimi. Nógv fólk flýddu um markið til grannalandið Tjad, men heldur ikki har fáa tey frið, tí tey vápnaðu harkaliðini fara um markið og gera seg inn á tey, skrivar The Independent.

Afrikanski eindarfelagsskapurin hevur roynt at fáa frið í lag, men uttan úrslit. Í fjør tosaði NATO um at senda friðarvarðveitandi hermenn til Darfur, men ætlanin bleiv slept.

# Ísraelski herurin vil sleppa at leypa á Hamas

**Ísraelska herleiðslan vil hava eina vápnaða uppgerð við Hamas, men politikararnir eru ímóti**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Palestinska sjálvmorðsbumban, sum drap níggju ísraelssmenn í Tel Aviv seinasta mánadag, fekk øði í ísraelsku herleiðsluna. Sambært blaðnum Maariv kravdi verjuovastin, Dan Halutz, generalur, at ísraelski herurin skuldi fara undir eina vápnaða uppgerð við Hamas beinanvegin. Blaðið við vera við, at verjuovastin og fleiri av hansara næstu monnum eru av teirri áskoðan, at tað slepst ikki undan einum samanbresti við Hamas, og at Ísrael eins væl kann taka uppgerðina alt fyri eitt.

Kravið frá verjuovastanum bleiv sambært Maariv viðgjørt á einum stjórnarfundi kvøldið eftir bumbuspreingingina, men eftir drúgva viðgerð gjørdi stjórnin av at havna kravinum. Serliga uttanríkisráðharrin, Tzipi Livni, skal hava verið ímóti einari hernaðarligari uppgerð við Hamas. Ehud Olmert, forsætisráðharri, helt tó fast um, at Ísrael fer at svara atsóknini í Tel Aviv á ein hóskandi hátt, sum hann tók til.

Maariv skrivar, at herleiðslan var sera misnøgd við avgerðina hjá stjórnini, og ovastin í fregnartænastuni, generalurin Amos Yadlin, skal hava sagt, at nú Hamas situr við tí politiska valdinum hjá palestinum, eru allir almennir bygningar í teimum palestinsku økjunum lóglig álopsmál.

– Vit eiga at kappa høvdið av slanguni, áðrenn hon gerst til ein dreka, siga generalarnir sambært Maariv.